


www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 11 - 2012

# Søvndal hitti føroyska Statoilstjóran

Týsdagin verður heldur sjáldsom og forkunng vitjan í Føroyum. Tá kemur danski sendiharrin fyri Arktis, Klavs A. Holm á vitjan. Hann fer at hava fund í Tinganesi m.a. við bólkin, sum løgmaður hevur sett at koma við eini frágreiðing um støðu Føroya í Arktis. Hann fer eisini at halda almennan fyrilestur, sum Fróðskaparsetrið skipar fyri. Tá fer Klavs Holm at leggja fram høvuðstankarnar í Kongeriget Danmarks Strategi for Arktisk 2011-2020, og Hanna í Horni frá Løgmansskrivstovuni fer at greiða frá um luttøku Føroya í arktiska samstarvinum. Tað verður á Østrøm frá 13 til 15. Vitjanin kemur stutt eftir, at arbeiðsgevari hansara, danski uttanríkisráðharrin, Willy Søvndal vitjaði í Føroyum. Tá umrøddu løgmaður og uttanríkisráðharrin møguleikan fyri, at danski arktiski sendiharrin eisini skuldi vitja í Føroyum. Umframt at hitta løgmann og eitt nú umrøða Arktis nýtti Willy Søvndal eisini høvi til undir Føroyavitjanini at tosa við føroyska stjóran sum situr í altjóða leiðsluni hjá Statoil við serligum atliti til arktiska økið, Rúna M. Hansen. Rúni M. Hansen greiddi uttanríkisráðharranum frá nýggju arktisku eindini hjá Statoil og hvørji mál hon hevur sett sær, eitt nú at bora 13 brunnar í tí arktiska økinum í komandi ári. Søvndali nýtti høvi til at greiða frá hvørjar hugsanir Danmark hevur á uttanríkispolitiska økinum viðvíkjandi Arktis. Bæði Noreg og Danmark eru limir í tí Arktiska Ráðnum. Myndir Willy Søvndal, uttanríkisráðharri, Rúni M. Hansen, ið situr í altjóða leiðsluni hjá Statoil og løgmaður høvdu høvi at møtast og skifta orð saman, tá teir møttust á flogvøllinum í Vágum herfyri. Myndir oljan.fo/Jan Müller